| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundir**<br>19. mars 2015 | Blað nr.: 12132 | |
| | Formansins merki: | |

**GERÐABÓK**

**Dato:** 19. mars 2015 **Kl**. 17:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 38/15 – 61/15

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Sjúrður Johan Olsen
Sigrún Amalia Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**
Mikael Viderø
Jóan Petur Hentze
Ingunn Eiriksdóttir

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18:00

## 41/15 Kunning um gerð av heildarætlanini til kommunuplan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 118/14 | 14/02088-15 |
| 10 Fíggjarnevnd | 26.02.2015 | 50/15 | 14/02088-15 |
| 11 Býráðsfundir | 26.02.2015 | 36/15 | 14/02088-15 |
| 12 Fíggjarnevnd | 11.03.2015 | 66/15 | 14/02088-15 |
| 13 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 41/15 | 14/02088-15 |
| 2 Tekniska nevnd | 26.05.2014 | 142/14 | 14/02088-15 |
| 3 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 180/14 | 14/02088-15 |
| 4 Tekniska nevnd | 23.06.2014 | 207/14 | 14/02088-15 |
| 5 Vinnunevndin | 23.06.2014 | 29/14 | 14/02088-15 |
| 6 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 155/14 | 14/02088-15 |
| 7 Trivnaðarnevndin | 23.06.2014 | 35/14 | 14/02088-15 |
| 8 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 156/14 | 14/02088-15 |
| 9 Fíggjarnevnd | 24.06.2014 | 205/14 | 14/02088-15 |

**Kommunuplanur**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Býráðið 27. januar 2011: Vald vóru Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal, Bogi Andreasen, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Niðursetti stýrisbólkurin fyri arbeiðinum, hevur arbeitt fram uppskot til "planstrategi" ið er fyrsta stigið av arbeiðinum. Teksturin til hetta verður týddur til føroyskt, og tá er tað greitt at leggja fram alment til hoyringar aftaná býráðssamtyktina.

**Tilmæli:**
Stýrisbólkurin mælir byggi-& býarskipanarnevndini til at taka undir við uppskotinum til planstrategi, og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. mars 2011:** Samtykt at taka málið av skrá og viðgera tað á einum serstøkum fundi.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Samtykt at taka málið av skrá og viðgera tað á einum serstøkum fundi saman við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Málið umrøtt. Stjórnin ger uppskot til skipan av arbeiðinum og nevndarsamansetingini, ið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**

Arbeiðið við kommunuplaninum var ikki heilt liðugt í 2012 og varð eisini lagt stilt áðrenn seinasta býráðsval. Í sambandi við skipan av nýggjum býráði eftir kommunuvalið var politisk avgerð tikin um, at kommunuplanur skuldi liggja undir fíggjarnevndini.

Klárt er nú at taka arbeiðið við kommunuplaninum upp aftur, og ráðgevin er biðin um eitt upplegg til tíðarætlan og eina kostnaðarmeting.

Sambært tíðarætlanini kann byrjast í desember 2013, og kann uppskotið til kommunuplan tá vera klárt til framløgu í býráðnum síðst í juni 2014. Almenn hoyring kann síðani vera frá medio juli til medio september 2014, og síðani endalig góðkenning í býráðnum síðst í september 2014.

Kostnaðurin at gera kommunuplanin lidnan er av ráðgevanum mettur til kr. 470.000 til 500.000 u. mvg. Harumframt koma innanhýsis útreiðslur.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til:

1. at játta kr. 600.000 av íløgukarminum fyri 2014 til miðbýarætlan, kto. 6275
2. at góðkenna uppskotið til tíðar-/arbeiðsætlan
3. at fíggjarnevndin tekur avgerð um umboð í politiskum fylgibólki
4. at stjórnin mannar stýrisbólkin
5. at býarskipanardeildin, undir leiðslu av býararkitekti, verður verkætlanarbólkur
6. at politiski fylgibólkurin og stýrisbólkurin innan endan av januar 2014 hava tikið avgerð um 3-4 høvuðsmál fyri planstrategiina fyri komandi 5 árini, fram til 2018.

**Fíggjarnevndin 11. desember 2013:** Umboð fyri Rambøll kunnaði um málið. Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at miðað verður eftir, at kommunuplanurin er liðugur at senda út í almenna hoyring medio mai 2014.

Samtykt at fíggjarnevndin er politiskur fylgibólkur.

**Býráðið 12. desember 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at eingin politiskur fylgibólkur verður valdur, men at alt býráðið fylgir málinum eftir skipaðari mannagongd.

**Ískoyti:**
Arbeiðið við kommunuplaninum hevur verið í gongd seinastu mánaðirnar. Umsitingin kunnar um málið.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Útsett.

**Tekniska nevnd 26. mai 2014:** Nevndin ynskir at viðgera endaliga uppskotið áðrenn málið skal fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Lidna kommunuætlanin verður framløgd.

**Tilmæli:**

Stjórnin mælir til at beina málið í faknevndirnar til ummælis, áðrenn málið fer fyri býráðið og til almenna hoyring.
Fíggjarnevnd 18. juni 2014: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 23. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum**.**

**Trivnaðarnevndin 23. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 23. juni 2014:** Málið umrøtt.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014**: Málið umrøtt.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við uppskotinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Eftir framløguna av Kommunuætlanin eru innkomnar 23 viðmerkingar (j. nr. 14/05126). Hesar eru gjøgnumgingnar av umsitingini og settar upp í eitt notat við stuttum samandrátti av viðmerkingini, uppskoti til svar til viðmerkjaran og um tað skal útloysa nakra broyting í Kommunuætlanini (j. nr. 14/02088-25). Styrisbólkurin hevur á fundi 24. februar viðgjørt kærurnar.

**Tilmæli:**
Styrisbólkurin fyri Kommunuætlanina mælir fíggjarnevndini til at taka undir við broytingum og svari til viðmerkjarar sambært samandrátti av viðmerkingum (j. nr. 14/02088-25) og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevnd 26. februar 2015:** Umrøtt og at leggja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Umrøtt.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Tekniski stjóri kunnaði um kommunuætlanina. Málið beint til býráðið til kunningar.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Framlagt.

# 42/15 Kvøldskúlin - hølisviðurskifti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.03.2014 | 56/14 | 14/01802-1 |
| 10 Fíggjarnevnd | 11.03.2015 | 53/15 | 14/01802-1 |
| 11 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 42/15 | 14/01802-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 70/14 | 14/01802-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 119/14 | 14/01802-1 |
| 4 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 109/14 | 14/01802-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 08.10.2014 | 182/14 | 14/01802-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 213/14 | 14/01802-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 05.11.2014 | 216/14 | 14/01802-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 227/14 | 14/01802-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 04.03.2015 | 54/15 | 14/01802-1 |

**Málslýsing:**
**Mentamálanevndin 6. mars 2014:** Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri, kunnaði um málið.

Sigrun Mohr varð ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Býráðið keypti í mai 2013 ovaru sjónvarpsbygningarnar í Vørðsluni, t.e. matrikklarnar 537b, 538b og 538a. Ætlan við hesum var at savna størri part av Kvøldskúlavirkseminum har. Í sambandi við keypið varð greitt, at bygningarnir tørvaðu ábøtur.

Kvøldskúlin hevur ynski um at taka partar av bygningunum í nýtslu sum skjótast, og hevur skotið upp, at framflyting av rakstri hjá kvøldskúlanum kr. 1,5 mió verður brúkt til at gera klár høli til tónleik og veving. Hetta vísir seg tó ikki at vera so lætt at fremja.

Arkitektavirki hevur gjørt skitsuppskot til innrætting av bygningunum til kvøldskúla eins og kostnaðarmeting fyri umvælingum v.m. frá oktober 2013, samlað mett til uml. kr. 8,5 mió við øllum. Tekniska fyrisiting tekur stór fyrivarni við hesi kostnaðarmeting m.a. vísandi til, at talan er um renoveringsprojekt, og kostnaðarmetingin tí er uml. 13 mió umframt mvg, ókent og ráðgeving. Til at koma víðari verður mett neyðugt við neyvari prosjekteringsgrundarlagi og heildarætlan viðvíkjandi bygningunum.

Annað ivamál eru útreiðslur í sambandi við brúnna yvir um M.A. Winthersgøtu. Ynski hjá Starvsmannafelagnum er at taka hana niður í summar, men bygningurin hjá Starvsmannafelagnum veitir ognini hjá Tórshavnar kommunu streym. Hetta er ikki vanlig mannagongd, og støða skal tí eisini takast til nýggja streymleiðing.

Harumframt er í frágreiðing staðfestur soppur í bygninginum. Tilráðing frá teknisku fyrisiting er ikki at taka bygningin í brúk til kvøldskúla, fyrr enn soppatrupulleikin er loystur.

Tá so er, er at meta nyttuleyst at brúka 1,5 mió uppá innrættingar júst nú. Heldur eigur arbeiði at vera sett í gongd at útgreina, hvat loysir seg best at gera, hvat skal gerast av funktiónsmessigum ávum, og hvat kostnaðurin verður.

Mett verður, at fyrireikandi arbeiðið fer at kosta uml. kr. 150.000. Eingin játtan er sett av á íløguætlanini til kvøldskúlan. Mett verður ikki rætt, at kvøldskúlin av rakstri rindar fyri projektfyrireikingar, og tí eigur játtan at verða fingin til vega um íløguætlanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og tekniski stjóri mæla til at játta kr. 150.000 til:

- At gjørd verður byggitøknilig støðulýsing at fáa greiðu á, hvørjir bygningslutir mugu høvuðsumvælast ella skiftast
- At gjørd verður kravspesifikatión viðvíkjandi nýtslu, hølum o.l. í samstarvi við kvøldskúlan, umframt byggitøknilga kravspesifikatión og myndugleikakrøv
- At gjørd verður umvælingarætlan í stigum, innihaldandi tíðarætlan og kostnaðarmeting sum grundarlag fyri fígging at seta í verk byggiætlanina.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina um at selja bygningarnar.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Ein meiriluti, Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge, taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, mælir til, at gjørd verður heildarætlan fyri bygningarnar.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 8. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til fundin 10. apríl 2014 og játta kr. 150.000 av kontu 5210 Tórshavnar-, Ungdóms- og Listaskúla til endamálið, og at nevndin hevur ástaðarfund til komandi fund.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 05. november 2014:** Útsett.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Nevndin var á ástaðarfundi í Kvøldskúlanum. Nevndin heitir á umsitingina um at gera uppskot til stigvísa umvæling og innrætting av hornahúsinum og høvuðsbygninginum, herundir kostnaðarmeting til næsta fund.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til umbyggingar- og umvælingarætlan av hølum og bygningum hjá Kvøldskúlanum í Vørðsluni og M.A. Winthers gøtu.

Við støði í nýggjari inniklimafrágreiðing verður mælt til, at drenað verður um húsini í M.A. Winthers gøtu 1 og um húsini í Vørðsluni 4, umframt at bróta gólvið upp, har sum vesini eru á hædd 1 í Vørðsluni 4. Garðurin millum húsini í M.A. Winthers gøtu 1 og Vørðsluna 4 skal eftir ætlan takast niður, og viðurskiftini við septiktanga gerast um. Hetta arbeiðið er ætlanin at bjóða út sum undirhondsboð millum tveir veitarar. Soleiðis kann hesin parturin byrja skjótast og verða fyrst avgreiddur.

Tað er ikki ætlanin at gera nakað við bygningin í M.A. Winthers gøtu 5 í hesum umfari, men verður ætlandi partur av øðrum byggistigi seinni.

-o-

Tørvurin hjá kvøldskúlanum at betra um viðurskiftini til veving er stórur. Meiri pláss skal til hetta virksemið, umframt at verandi høli í J. H. Schrøters gøtu 1 (Einars Prent) eftir ætlan skulu brúkast til aðra undirvísing, sum hølini eru betri egnaði til, m.a. til "mál og mentan fyri útlendingar", føroyskt fyri útlendingar og onnur fremmandamál, sum nú húsast í Venjingarskúlanum um kvøldarnar.

Ætlanin er, at veving skal vera í erva í Vørðsluni 4. Í niðaruhædd skal tónleikur halda til (3 smærri tónleikahøli og eitt størri studio til samanspæl). Størra hølið kann eisini brúkast til smærri tónleikartiltøk, kórvenjingar og fyrilestarar. Við hesum hevur kvøldskúlin ikki longur tørv á hølum í Margarinfabrikkini, og sum ætlandi Klippfisk, ið higartil hevur hildið til í M.A. Winthers gøtu 1, fær í staðin. Í niðaru hæddini skal umframt tónleik eisini verða tekøkur og betraði vesiviðurskifti.

Nýggj høvuðsinngongd skal verða til bygningin í Vørðsluni. Høvuðsinngongdin verður flutt at verða úr norðara enda til langsíðuna eystureftir.

Mett verður, at fígging er ikki tøk til at umvæla húsini M.A. Winthers gøtu 1 í hesum byggistigi. Her skal ætlandi glaslist verða í neðra og seymistova í erva.

-o-

Kostnaðarmeting er gjørd fyri omanfyri nevndu arbeiði, innbúgv og útgerð v.m. Útreiðslur til nýggjar útsíður á bygningin til Vørðsluna 4 eru ikki tiknar við í kostnaðarmetingina, men liggur eftir ætlan í einum øðrum byggistigi. Tað sama er við útreiðslunum at gera skitsuuppskot til eina heildarætlan fyri økið.

Ætlanin er at fíggja omanfyri nevndu umvælingar, sum eru at meta sum fyrsta byggistig, av staðfestari minninýtslu í rakstri hjá kvøldskúlanum. Tøk játtan, um øll minninýtslan pr. 31. desember 2014 verður brúkt til endamálið, er kr. 3.352.000. Umvælingarnar eru tó so umfatandi, at tær mugu metast sum ein íløga..

Byggitíðin er mett til 7-8 mðr.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á kvøldskúlanum mæla til at samtykkja uppskotið til umbyggingar- og umvælingarætlan, og til endamálið at játta kr. 3.352.000 av rakstrarkontu 5210 Tórshavnar Kvøld-, Ungdóms- og Listaskúli til íløgukontu 5275, Kvøldskúlin.

**Mentamálanevndin 04. marts 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Sjúrður Olsen, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum at játta pening av rakstrinum til íløgur og mælir til, at umvælingararbeiðið verður boðið út sum aðrar verkætlanir av slíkum slag, og at arbeiðið verður játtað av íløgum.

Jógvan Arge tekur støðu á einum seinni fundi og ynskir frágreiðing um, hvussu hetta avlopið í rakstrinum hjá Kvøld- og ungdómsskúlanum er íkomið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge,Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein.

# 43/15 Føroya Fimleikasamband: Umsókn um stuðul til HM 2015 í estetiskum fimleiki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 25.02.2015 | 29/15 | 14/04817-5 |
| 2 Fíggjarnevnd | 11.03.2015 | 52/15 | 14/04817-5 |
| 3 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 43/15 | 14/04817-5 |

**Málslýsing**:
Fimleikasamband Føroya skipar fyri HM í estetiskum fimleiki í døgunum 4. til 8. juni 2015 og søkir um stuðul frá Tórshavnar kommunu til tiltakið.

Í umsókníni stendur m.a.:
"Hetta verður størsta ítróttartiltakið, sum hevur verið í Føroyum. Tað koma umleið 700 íðkarar, umframt viðhaldsfólk. Kappingin og øll gisting kemur at vera í Tórshavn, býurin kemur at vera miðpunktið hesar dagar, bæði við plakatum, lýsingum, øllum teim livandi fimleikarunum og viðhaldsfólki teirra, sum koma at hava sína gongd aftur og fram til ítróttarøkið."

Til kappingar og venjingar skulu Høllin á Hálsi, Fimi og Gundadalshøllin nýtast, og neyðugt er við broytingum/innrættingum í hallunum, sum byggi- og umhvørvisdeildin hevur góðkent í skrivi 20.05.2015. (mál 14/03025)

Sambært kostnaðarmeting frá hallarvørðinum verður kostnaðurin tils. kr. 379.000.

Útgreining av upphæddini er:
- kr. 15.000 fyri leigu av Fimi í fimm dagar
- kr. 84.000 fyri leigu av Høllini á Hálsi í 28 dagar
- kr. 80.000 fyri gerð av áskoðaraplássum og leigu
- kr. 200.000 fyri keyp av 2 skíggjum. Hetta eru skíggjar, sum høllin skal eiga og at brúka til onnur tiltøk.

Mett verður, at leiguútreiðslurnar hjá Fimleikasambandinum kunnu játtast av stuðulskontu, men at kommunan ber útreiðslurnar til áskoðarapláss og keyp av skíggjum. Fígging er tó ikki tøk hjá ítróttahallunum, men kann fáast til vega av íløgukarmi ætlað Høllini á Hálsi.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Fimleikasambandi Føroya upp til kr. 99.000 í veitingum til leigu av Fimi og Høllini á Hálsi. Harumframt verður mælt til, at kr. 280.000 verða játtaðar av løgukarmi 5775 ítróttaranlegg ætlað Høllini av Hálsi til keyp av 2 skíggjum og gerð av áskoðaraplássum til kappingina.

**Mentamálanevndin 25. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina játtanina av løgukarminum í býráðið um fíggjarnevndina.

Ískoyti: Av misgáum er umsóknin um fimleikateppið, tvs. sjálvt kappingargólvið, ikki komin við. Eitt kappingargólv kostar uml. 100.000, leveringstíðin er 5 vikur. Mett verður, at høllin við fyrimuni kundi keypt eitt slíkt gólv til framtíðar fimleikakappingar. Við hesum gólvinum hevur høllin slík kappingargólv til hondbólt, flogbólt, badminton, borðtennis og fimleik. Kostnaðurin kann fíggjast á løgukarminum 5775.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Samtykt at játta Fimleikasambandi Føroya upp til kr. 99.000 í veitingum av konto 5365, stuðul til ítrótt, og at játta kr. 380.000 av løgukarmi 5775 til L57003 Høllin á Hálsi, til keyp av tveimum skíggjum, kappingargólvi og gerð av áskoðaraplássum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundir**<br>19. mars 2015 | Blað nr.: 12142 |
| | | Formansins merki: |

# 44/15 Navn til nýggja vegin til høvuðssætið hjá BankNordik

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevnd | 03.03.2015 | 4/15 | 15/00405-4 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.03.2015 | 57/15 | 15/00405-4 |
| 3 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 44/15 | 15/00405-4 |

**Málslýsing**:
BankNordik byggir nýtt høvuðssæti á matr. nr. 1292a við R.C. Effersøsgøtu. Í sambandi við byggingina verður vegur gjørdur frá Tjaldursvegi til bankan, og hesin vegurin skal hava eitt navn.

**Gøtunavnanevnd 03. marts 2015:** Nevndin mælir til navnið «Oknarvegur». Mett verður, at tað er hóskandi, at vegurin fær eitt fuglanavn, tí allir vegirnir á økinum hava fuglanøvn.

Nevnin tekur ikki undir við navninum «Húsagarður», sum skotið er upp, tí tað er eitt pláss í gomlu Havnini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 04. marts 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Einmælt samtykt.

# 45/15 Alvilda Johannesen : Áheitan um at fáa skeyti upp á neystið á matr. nr. 145z, Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 11.03.2015 | 58/15 | 14/05294-6 |
| 2 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 45/15 | 14/05294-6 |

**Málslýsing**:
Einkjan eftir Svenning Johannesen, Alvilda Johannesen, Kollafjørður hevur sent kommununi eina áheitan, um at fáa endaliga skeytað matr. nr. 145z, Kollafjørður til sín.

Svenning Johannesen átti eitt neyst á matr. nr. 103, Kollafjørður. Kommunan átti lendið og Svenning Johannesen neystið. Tá landsvegurin skuldi gerast í Kollafirði mistu fleiri neystaeigarar neyst síni – eisini Svenning Johannesen. Møguleiki bleiv at byggja neyst við nýggja bátahylin í Kollafirði og liggur ein neystablokkur har í dag. Ytsta neystið í hesum neystablokki, matr. nr. 145z, hevur Svenning Johannesen, sáli, bygt miðskeiðis í 80´inum.

Skjølini í málinum tala fyri, at lendið (matr. nr. 145z) undir neystinum hjá Svenning Johannesen, sála, skuldi skeytast honum, men er av einhvørjari orsøk ikki gjørt. Kollafjarðar kommuna váttar, sí skjal hjá Matrikulstovuni, at lendið skuldi vera honum til ognar. Samtyktini í gerðabókini hjá Kollafjarðar bygdarráð hin 20. juni 1985 vísir, at neystagrundin hjá Svenning skuldi hava sama status sum hinar.

**Tilmæli**:
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla fíggjarnevndini til at skeyta lendið á matr. nr. 145z, Kollafjørður til Alvildu Johannesen, einkjan eftir Svenning Johannesen, og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Einmælt samtykt.

# 46/15 Viðurskifti á Jekaragøtu í sambandi við íbúðarbygging hjá Bústaðir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.09.2014 | 233/14 | 14/04059-4 |
| 2 Tekniska nevnd | 11.02.2015 | 24/15 | 14/04059-4 |
| 3 Fíggjarnevnd | 26.02.2015 | 48/15 | 14/04059-4 |
| 4 Býráðsfundir | 26.02.2015 | 34/15 | 14/04059-4 |
| 5 Fíggjarnevnd | 11.03.2015 | 55/15 | 14/04059-4 |
| 6 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 46/15 | 14/04059-4 |

### Lýsing av málinum - samandráttur
Víst verður til mál nr. 14/00904 og 2013-1167 viðv. umsókn frá Albert Isfeld, Arkitekti vegna Bústaðir um bygging av 12 nýggjum íbúðum "Yviri við Strond". Í sambandi við hetta málið um íbúðarbygging á matr. nr. 620ai og 620ak, Tórshavn, hevur spurningurin um møguliga dagføring av Jekaragøtu tikið seg upp.

### Lógir, ásetingar o.a.
Ongar viðmerkingar.

### Upplýsingar frá umsitingini
Jekaragøta er kommunalur vegur og liggur á matr. nr. litra 'fp', partur av Djóna í Geil gøtu. Vegurin er ein sokallaður sethúsavegur og eru í dag 5-6 matrikuleindir knýttar at vegnum. Tá íbúðaríbyggingin er liðug og fólk í 12 nýggjum íbúðareindum fara at búleikast á økinum, verður ferðslan munandi økt í mun til trýstið í dag. Jekaragøta er bert uml. 6 m breið, harav 2,0 til 2,5 m eru privat ogn. Á niðara borði er grasskrái. Samlaða tøka breiddin á Jekaragøtu sambært matriklinum er ca. 8 m og er rúm fyri at gera ein hóskandi sethúsaveg við breidd á 5,50 m til koyribreyt umframt 1,5 m til gongubreyt.

Mett verður tað verða neyðugt at dagføra Jekaragøtu, tí verandi breidd er ikki hóskandi til komandi ferðslutrýstið.

### Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
Grannar hava víst á tørvin orsakað av væntandi øktari ferðslu, og umsøkjarin hevur sjálvur víst á, at tað vildi verið ein betri loysn fyri kommununa at gjørt ábøturnar nú, meðan byggingin fer fram heldur enn at bíða nøkur ár.

### Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.
Ongar viðmerkingar.

### Umhvørvisárin.
Ongar viðmerkingar.

### Fíggjarlig viðurskifti.
Umsitingin hevur samskift við Bústaðir og ráðgeva hjá stovninum, men tað fyriliggur eingin ítøkilig fíggjarlig meting av arbeiðinum at dagføra vegin. Heldur ikki fyrilggur tekniskt tilfar, ið lýsir støðuna á Jekaragøtu og hvussu ein dagføring sambært omanfyri standandi kann útinnast.

## Viðmerkingar frá øðrum deildum
Ongar viðmerkingar.

## Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum
Ongar viðmerkingar.

## Skjøl
Eru í málinum.

## Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at gera avtalu við Bústaðir um dagføring av Jekaragøtu at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 9. september 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, latið gera kostnaðarmeting av at dagføra Jekaragøtu. Dagføringin fevnir m.a. um at breiðka Jekaragøtu til ca 9 m við gongubreyt á eystaru síðu (móti Bústaðum). Kostnaðarmetingin er grundað á lisitatiónsúrslit frá undirholdsboði sambært skitsuuppskoti og ikki detailprojekti. Dagføringin av Jekaragøtu kemur at kosta uml. 2,1 mió. kr. sambært skjali nr. 14/04059-19.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Tað er ikki settur peningur av til arbeiðið innan verandi íløgukarmum fyri 2015.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við lægsta boði, frá Spf. Maskingrevstur áljóðandi kr. 1.463.897,83 uttan mvg. og at beina málið í fíggjarnevndina at taka støðu til fíggingina. Harumframt verður mælt til at beina málið í býráðið.

**Tekniska nevnd 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 26. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at fíggja upphæddina av konto 8175, íløgukarminum fyri brúnna um Sandá.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti til fíggjarnevnd og býráð.**
Í sambandi við viðgerðina av málinum um fíggingina var í tilmælinum til teknisku nevnd mælt til at taka undir við lægsta boði, frá Spf. Maskingrevstur áljóðandi kr. 1.463.897,83 uttan mvg. og at beina málið í fíggjarnevndina at taka støðu til fíggingina. Samlaði kostnaðurin fyri arbeiðið er fyriuttan tilboðið frá sp/f Maskinkoyring eisini projektering, eftirlit, umsiting, ókendar útreiðslur og mvg. Sostatt gerst samlaði kostnaðurin fyri dagføringina av Jekaragøtu uml. 2,1 mió. kr. sambært skjali nr. 14/04059-19 og er tørvur á eini meirjáttan álj. kr. 636.102,17.

Í býráðssamtyktini 26. februar 2015 var samtykt at játta fígging til dagføringina av konto 8175, Brúgv um Sandá. Sambært fíggjarkarmum fyri 2015 vóru settar av 55 mió av brúgvaprojektið (j. nr. 14/00090). Býráðið samtykti 26. februar 2015 at játta 53.030.000 til

brúgvaprojektið og vóru sostatt kr. 1.970.000,- tøkar áðrenn avgjørt var at taka kr. 1.463.897,83 av hesi játtan til dagføring av Jekaragøtu. Sostatt eru einans kr. 506.102,17 tøkar.

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta írestandi upphædd áljóðandi kr. 636.102,17 soleiðis at kr. 506.102,17 av íløgukarminum fyri Brúnna við Sandá og kr. 130.000 av framfluttum karmi á 8175, Íløgur vegir.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Sjúrður Olsen, samtykkir at taka undir við tilmælinum og at taka upp samráðingar við Bústaðir um at bera kostnaðin at dagføra Jekaragøtu og at beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Einmælt samtykt at gera avtalu við Bústaðir um at fíggja írestandi upphæddina á kr. 636,102,17

## 47/15 Kommunala Brennistøðin : Móttøkuskipan fyri papp/pappír á Hjalla (2012-0568)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.03.2015 | 14/15 | 15/00687-9 |
| 2 Fíggjarnevnd | 11.03.2015 | 61/15 | 15/00687-9 |
| 3 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 47/15 | 15/00687-9 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunala Brennistøðin hevur leingi ynskt og havt ætlanir um at skipa eina betri móttøku og umlastingarstøð til papp og pappír á Brennistøðini á Hjalla, har ið møguleiki er at móttaka størri nøgdir av pappi, og at pressa papp og pappír í ballir til beinleiðis útflutnings.

Endamálið er at kunna selja tilfarið beinleiðis, og harvið fáa vinning burturúr, í staðin fyri at gjalda til IRF fyri at sleppa av við tilfarið. Við at betra um fíggjarliga úrslitið, ber til at lækka prísin (og við tíðini kanska at geva pengar) fyri papp/pappír, økist incitamentið fyri at skilja meiri papp og pappír til endurnýtslu.

Ein av forðingunum fyri at seta skipanina í verk hevur verið, at neyðugt er at hava hóskandi høli, har til ber at hava eina pressu, men einki høli hevur verið tøkt, og mett hevur verið, at tað er ov dýrt at leiga eitt høli. Men Kommunala Brennistøðini hevur í seinastuni eisini arbeitt við at umleggja flutningin og viðgerðina av vandamiklum burturkasti, soleiðis at minni tørvur verður á goymsluhøli til vandamikið burturkast. Ætlanin er so at nýta hølið, sum higartil hevur verið nýtt til goymslu av vandamiklum burturkasti, til at pressa papp og pappír.

Umboð fyri Kommunalu Brennistøðina hava í februar í ár verið og hugt at trimum ymsum pressum, ið vórða mettar at vera egnaðar til okkara tørv. Útfrá hesum er funnið fram til eina pressu, sum verður mett at verða mest hóskandi. Aftrat sjálvari pressuni skal nakað av útgerð útvegast, t.d. goymslubingjur til ballur, og nýggjar móttøkubingjur á Endurnýtsluni.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Kostnaðarmetingin fyri íløguna (pressu, flutning, uppseting, ymsa útgerð og ókent), er mett til umleið 0,6 mió. Víst verður til skjal nr. 2012-0568/1 fyri nærri útgreining.

Raksrarúrslitið av endurnýtsluskipanini fyri papp og pappír verður sambært kalkulatiónum mett at batna við millum 0,1 - 0,3 mió. árliga, við óbroyttum nøgdum, og teimum søluprísum, sum vit hava fingið upplýst frá Danbørs.

Søluprísunum er tó skiftandi, og tí er torført at siga neyvt, hvussu úrslitið verður. Í kalkulatiónini er eisini innroknað avskriving av íløguni yvir 10 ár, umframt lønarútreiðslur (14 tímar pr. viku), men ætlanin er at nýta verandi starvsfólkahóp, og tí koma ikki eyka lønarútreiðlsur til hesa ætlanina. Víst verður annars til skjal nr. 2012-0568/1 fyri nærri útgreining.

Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini metir ikki, at fíggjarligt rúm er á rakstrarjáttanini fyri 2012 hjá Kommunalu Brennistøðini. Leiðarin á kommunalu Brennistøðini søkir tískil um játtan á 0,6 mió. av íløgum til ætlanina, soleiðis at farast kann undir at fremja ætlanina.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina og leiðarin fyri Kommunalu Brennistøðina mæla til, at játta kr. 0,6 mió. av íløgum fyri 2012, § 7, 7175, og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. mars 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og at játta kr. 0,6 mió. av íløgum fyri 2012, § 7, 7175.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanar-reglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin 'Móttøkuskipan fyri pappír og papp', L71004, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest avlop álj. kr. 81.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Kunnað varð um málið. Málið beint í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Einmælt samtykt.

# 48/15 Miðbýarætlan - Uppihaldstrappa í Vágsbotni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 59/14 | 14/05063-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.03.2015 | 88/15 | 14/05063-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 17.03.2015 | 39/15 | 14/05063-1 |
| 12 Fíggjarnevnd | 18.03.2015 | 72/15 | 14/05063-1 |
| 13 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 48/15 | 14/05063-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 330/14 | 14/05063-1 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 253/14 | 14/05063-1 |
| 4 Ferðslunevndin | 27.01.2015 | 11/15 | 14/05063-1 |
| 5 Ferðslunevndin | 03.02.2015 | 12/15 | 14/05063-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 11.02.2015 | 29/15 | 14/05063-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2015 | 28/15 | 14/05063-1 |
| 8 Fíggjarnevnd | 26.02.2015 | 49/15 | 14/05063-1 |
| 9 Býráðsfundir | 26.02.2015 | 35/15 | 14/05063-1 |

**Málslýsing:**

Í sambandi við hugskots- og prosjektkappingina, sum var liðug 16. mai 2014 (journal nr. 14/01637), var ætlanin at koma í gongd við at gera fyribils kostnaðarmetingar og raðfesta tey ymisku átøkini í miðbýnum til langtíðar íløguætlanina hjá býráðnum (journal nr. 14/01463).

Kappingin var býtt sundur í tvær uppgávur, eina heildarætlan fyri allan miðbýin og eina prosjektkapping fyri økið kring Steinatún.

Í sambandi við kappingina hava Zeta arkitektar, sum fingu 1. virðisløn í kappingini, gjørt eina fyribils kostnaðarmeting av eini uppihaldstrappu í Vágsbotni. Kostnaðarmetingin fevnir um eitt øki uppá 310 m$^2$ millum Mylnugøtu og Bryggjubakka.

Kostnaðarmetingin er gjørd út frá einum skitsuuppskoti, ið fevnir um eina uppihaldstrappu í ljóst-litaðum betongi, ið bindur økið framman fyri Bojsensgarð og torgið í Vágsbotni saman. Trappan verður skipað við smærri uppihaldsøkjum úr timbri umframt trøum og plantum. Talan er somuleiðis um ein lítlan pop-up pall við segldúki, ið kann setast upp í sambandi við tiltøk, nýggj ljósarmatur, nýggjan belegning framman fyri Bojsensgarð og eina lækkan av grótlaðaða garðinum. Økið framman fyri Havnar kirkju, ið fevnir um 250 m$^2$, kann møguliga eisini gerast ein partur av uppskotinum (verður roknað sum tilval).

Kostnaðarmetingin ljóðar uppá kr. 1.911.609. Og við eini óvissu uppá 20% gevur tað kr. 2.300.000 mió.

Býarskipanardeildin mælir nevndini til at taka støðu til, um peningur skal játtast til prosjektering av verkætlanini, soleiðis at ein meira nágreinilig kostnaðarmeting kann gerast fyri verkætlanina.

Í upprunaligu íløguætlanini fyri 2014 stóðu kr. 9 mió. til miðbýarætlan og kr. 2 mió. til spælipláss í miðbýnum. Eftir endurskoðan av íløguætlanini og flytingar til onnur endamál eru í dag kr. 3.109 mió. til miðbýarætlan og kr. 850.00 til spælipláss í miðbýnum. Í uppskotinum til íløguætlan fyri 2015 eru kr. 5 mió. settar av til miðbýarætlan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur støðu til um arbeiðast skal víðari við ætlanini.

Um arbeiðast skal víðari við ætlanini, mælir tekniski stjórin til:
- at játtaðar verða kr. 110.300 av íløgunum til miðbýarætlanina, til prosjektering og útbjóðing
- at projekt verður gjørt og arbeiðið boðið út í innbodna lisitatión
- at málið verður lagt fyri nevndina aftur, tá tilboðini eru komin inn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum eftir leistinum omanfyri og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at planleggja uppihaldstrappuna, er uppskot komið frá Zeta arkitektum, at broyta vegaføringina á brekkuni niðan á Bryggjubakka.

**Ferðslunevndin 27. januar 2015:** Málið umrøtt, Zeta arkitektar arbeiða víðari við málinum.

**Ferðslunevndin 03. februar 2015:** Zeta arkitektar framløgdu tvey uppskot, uppskot 1 og uppskot 2. Nevndin samtykti at taka undir við uppskot nr. 2. Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av viðgerðini av málinum um trappuna skal støða verða tikin til møguliga dagføring av brekkuni niðan á Bryggjubakka.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Eingin peningur er settur av til at dagføra brekkuna niðan á Bryggjubakka innan íløgur fyri 2015.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við ferðslunevndini.
Harumframt verður mælt til at játta kr. 100.000,- til at gera skitsuuppskot við kostnaðarmeting av at dagføra brekkuna niðan á Bryggjubakka, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 11. februar 2015:** Umboð frá Zeta Arkitektum løgdu fram uppskot um loysn av trappu og ferðsluloysn á økinum, dagf. 11.02.2015. Nevndin samtykti at taka undir við ferðslunevndini og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til víðari avgreiðslu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2015:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 100.000,- til skitsuuppskot við kostnaðarmeting at leggja fyri faknevndirnar aftur og at arbeiðið verður fíggjað av kto 8175 íløgur fyri vegaætlanir 2015.

**Fíggjarnevnd 26. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Samtykt við 12 atvkøðum fyri og ongari ímóti at játtað 100.000 kr. av konto 8175 til skitsuuppskot við kostnaðarmeting.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at planleggja uppihaldstrappuna, har sum Perlan á sinni stóð, er kostnaðarmetingin dagførd út frá betri loysnum í sambandi við vali av tilfari. Í upprunaliga uppskotinum var ljóst litað betong valt sum tilfar til trappuna. Nýggja uppskotið vísir á føroyskt grót sum tilfar, tí tað bæði hóskar seg betri til økið og úttrykkið á staðnum.

Sambært metingum frá Zeta arkitektum er dagførda kostnaðarmetingin 2.576.865 kr. uttan MVG. Pallur áljóðandi 153.000 kr. er íroknaður kostnaðarmetingina. Pallurin kann sparast burtur, men fyri at fáa eitt nøktandi heildarprosjekt mælir býarskipanardeildin frá at spara pallin burtur.

Í dagførdu kostnaðarmetingini verður óvæntað roknað við 20%, men um hetta verður sett niður til 15%, og pallurin er spardur burtur, verður samlaða kostnaðarmetingin kr. 2.265.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at játta samlaðu upphæddina kr. 2.737.919 við MVG av kto. 6275 fyri miðbýarætlanina og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 17. mars 2015:** Kunnað varð um málið.
**Ískoyti:**
Trý tilboð eru komin inn at gera uppihaldstrappuna og dagføra vegin (mál 15/00790). Talan er um samlað tilboð fyri bæði arbeiðini, sí j.nr. 15/00790

Sp/f Andrias Berg hevur lægsta tilboðið áljóðandi kr. 2.344.767,00.

Articon hevur næstlægsta tilboðið áljóðandi kr. 3.208.235,00.

J&K Petersen hevur boðið sær at gera arbeiðið fyri kr. 3.422.178,00.

Tilmæli:
Tekniski stjóri mælir til at taka av lægsta tilboðnum hjá Sp/f Andriasi Berg og viðvíkjandi arbeiðinum at gera uppihaldstrappuna at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndni og játta kr. 2.737.919 við MVG av kto. 6275 fyri miðbýarætlanina og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevnd 18. marts 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið i býráðið.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundir**<br>19. mars 2015 | Blað nr.: 12152<br><br>Formansins merki: |

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Einmælt samtykt.

# 49/15 Dagføring av vegnum undir Bryggjubakka- við uppihaldstrappuna har Perlan hevur staðið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.03.2015 | 89/15 | 15/00790-6 |
| 2 Tekniska nevnd | 17.03.2015 | 38/15 | 15/00790-6 |
| 3 Fíggjarnevnd | 18.03.2015 | 73/15 | 15/00790-6 |
| 4 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 49/15 | 15/00790-6 |

**Málslýsing**:
Í sambandi við arbeiðið at planleggja uppihaldstrappuna, har sum Perlan á sinni stóð, er uppskot komið frá Zeta arkitektum um at broyta vegaføringina á brekkuni niðan á Bryggjubakka. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 14/05063, at støða er tikin til linjuføringina av niðankoyringini á Bryggjubakka og staðfest av teknisku nevnd. Í nýggja uppskotinum verður hallið á vegnum betri, og vegurin gerst somuleiðis ein betri inngongd til Reyn. Broytta vegaføringin gerst ein betri liður í ferðslumynstrinum í Vágsbotni, ið bindur teir ymsu vegirnar og gonguteigarnar saman. Umstøðurnar gerast betri og tryggari hjá fólki til gongu, tí umskipanin letur upp fyri einum øki framman fyri uppihaldstrappuni, sum gerst ein gonguleið og sambindingarliður í ferðslumynstrinum. Ein nýggj umskipan av vegnum gerst harafturat eitt gott byrjanarstøði í eini møguligari framtíðarætlan fyri torgið í Vágsbotni, tí vegurin verður sneiddur ímóti torginum, sum er ein týdningarmikil liður í eini skipan av einum nýggjum torgi.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Sambært metingum frá Zeta arkitektum kemur dagføringin av vegnum at kosta uml. 2,1 mió. kr. Higartil eru játtaðar kr. 100.000,- av kto. 8175 til skitsuuppskot við kostnaðarmeting, so írestandi arbeiðið tørvar eina játtan álj. kr. 2.016.000,-. Lisitatión fyri innbodnum arbeiðstakarum ísv. undirhondsboð verður hildin 16.03.2015, og tá ber til at upplýsa ítøkiligari hvussu kostnaðarstøðið verður.

**Tilmæli til teknisku nevnd:**
Tekniski stjórin og býarverfrøðingurin mæla til at játta kr. 2.016.000,- av kto. 8175 fyri vegir 2015 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mars 2015:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 17. mars 2015:** Nevndin samtykti at játta kr. 2.740.000 av konto 8175 samsvarandi skjali nr. 15/00790-11 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Ìskoyti:**
Trý tilboð eru komin inn at gera dagføra vegin og gera uppihaldstrappuna (mál 14/05063).
Talan er um samlað tilboð fyri bæði arbeiðini, sí j.nr. 15/00790-10.

Sp/f Andrias Berg hevur lægsta tilboðið áljóðandi kr. 2.344.767,00.

Articon hevur næstlægsta tilboðið áljóðandi kr. 3.208.235,00.

J&K Petersen hevur boðið sær at gera arbeiðið fyri kr. 3.422.178,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka av lægsta tilboðnum hjá Sp/f Andriasi Berg og viðvíkjandi arbeiðinum at dagføra vegin at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 2.740.000 av konto 8175 samsvarandi skjali nr. 15/00790-11 og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevnd 18. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Einmælt samtykt.

# 50/15 Bygging av dagstovni í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 10.06.2014 | 30/14 | 14/03251-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 175/14 | 14/03251-1 |
| 3 Kollafjarðarnevndin | 07.10.2014 | 24/14 | 14/03251-1 |
| 4 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 145/14 | 14/03251-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 206/14 | 14/03251-1 |
| 6 Kollafjarðarnevndin | 10.11.2014 | 30/14 | 14/03251-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 25.02.2015 | 27/15 | 14/03251-1 |
| 8 Fíggjarnevnd | 11.03.2015 | 51/15 | 14/03251-1 |
| 9 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 50/15 | 14/03251-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður eisini til mál 14/01859. Nú byggisamtyktin fyri ætlaða økið við Botnánna til nýggja dagstovnin er góðkend av landsstýrinum, er klárt at fara í gongd við at fyrireika byggiverkætlanina. Fyrsta stig er at fáa til vega kravspesifikatión og byggiskrá fyri nýggja stovninum.

Á íløguætlanini fyri 2014 eru kr. 14 mió settar av til nýggjan dagstovn í Kollafirði. Áður eru játtaðar kr. 1,5 mió til keyp av grundøkið og fyrireikingar v.m. Mett verður, at fíggjartøvur til fyrireikingar, kravspesifikatión, byggiskrá og útbjóðingartilfar er kr. 1 mió.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta kr. 1 mió av íløgukontu 3175 Dagstovnur í Kollafirði til nevndu fyrireikingar.

**Trivnaðarnevndin 10. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt at játta 1 mió. av konto 3175 til fyrireiking av dagstovni í Kollafirði, at bjóða dagstovnin út í umvendari licitatión og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Kollafjarðarnevndin 07. oktober 2014:** Borgarstjórin kunnaði um, at um 10 dagar verður klárt at senda út kravspecificatión til tveir arbeiðstakarar sum síðani skulu geva tilboð upp á arbeiðið.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Kollafjarðarnevndin 10. november 2014:** Borgarstjórin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Tilboð eru komin inn og meting gjørd, sum verður løgd fram fyri nevndini á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at geva umsitingini heimild til at samráðast við lægsta tilboðsgevara um sáttmála.

**Mentamálanevndin 25. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við lægsta tilboðsgevara. Við viðmæltum tilkeypum kr. 1.119.500, herundir at fáa til vega jarðhitaskipan til bygningin, verður samlaði totalarbeiðstøkusáttmálin áljóðandi kr. 13.970.280.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at gera totalarbeiðstøkusáttmála við Sp/f Bulur áljóðandi kr. 13.970.280.

**Ískoyti:**
Lisitatión fyri nýggjum dagstovni í Kollafirði var 26. januar 2015. Tvey tilboð komu inn: Sp/f Bulur kr. 12.850.780, og Sp/f Búsetur kr. 21.314.371. Samráðingar hava verið við lægsta tilboðsgevara. Við viðmæltum tilkeypum kr. 1.119.500, herundir at fáa til vega jarðhitaskipan til bygningin, verður samlaði totalarbeiðstøkusáttmálin áljóðandi kr. 13.970.280 u/mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at gera totalarbeiðstøkusáttmála við Sp/f Bulur áljóðandi kr. 13.970.280.

**Mentamálanevndin 18. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at restfíggingin verður fingin til vega av løgukarminum fyri 2016 og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. mars 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at játta restfíggingina av íløgukarminum fyri 2016 og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Einmælt samtykt.

# 51/15 Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri víðkan av Skansabryggjuni og eystara havnaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 17.03.2015 | 7/15 | 15/00833-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.03.2015 | 91/15 | 15/00833-1 |
| 3 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 51/15 | 15/00833-1 |

## **Málslýsing**:

Fyrireikingin, við at víðka um Skansabryggjuna og Eystara havnaøki við uml. 163.000 $m^2$ og eini atløgusíðu uppá uml. 700 m, er nú komin væl áleiðis (journal nr. 14/00896). Býráðið samtykti á fundi 30. oktober 2014, at broyta almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu soleiðis, at B1-havnaøkið verður víðkað samsvarandi ætlaðu útbyggingini av havnaøkinum. Hetta málið var sent Fiskimálaráðnum 6. januar 2015 til endaliga góðkenning. Enn er einki svar komið frá Fiskimálaráðnum.

Býarskipanardeildin hevur nú í samráð við Tórshavnar havn gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri skipan av víðkanini av Skansabryggjuni og eystara havnaøki.

## **Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina**:

Tekniski stjórin mælir til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt (j.nr. 15/00833-2,3,4,5,6,7,8, og 9) og beina málið í býráðið.

**Vinnunevndin 17. mars 2015:**

Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Bjørghild Djurhuus taka undir við tilmælinum við hesi broyting í uppskotinum j.nr. 15/00833

1) § 4 stk 4.10 verður broytt til B1.
2) Eindin B á tí innara molanum í kortskjali 3 verður breiðkað, so tað samsvarar við byggiøki B3 á kortskjali 2 á tí innara molanum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum tí at ikki aðrir møguleikar eru kannaðir fyri víðkaðari góðshavn í kommununi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mars 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Bjørghild Djurhuus og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og broytingunum hjá vinnunevndini.
Ein minniluti, Jákup Dam, tekur ikki undir við tilmælinum tí at ikki aðrir møguleikar eru kannaðir fyri víðkaðari góðshavn í kommununi

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá byggi- og býarskipanar-nevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

- Nú fór Bjørghild Djurhuus

# 52/15 Útstykking á Kongavarða til raðhús matr. nr. 255a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 72/14 | 14/05160-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 333/14 | 14/05160-2 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 259/14 | 14/05160-2 |
| 4 Fíggjarnevnd | 10.12.2014 | 346/14 | 14/05160-2 |
| 5 Fíggjarnevnd | 15.12.2014 | 349/14 | 14/05160-2 |
| 6 Býráðsfundir | 15.12.2014 | 262/14 | 14/05160-2 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 14/05160-2 |
| 8 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 52/15 | 14/05160-2 |

**Málslýsing**:
Tórshavnar kommuna hevur keypt matr. nr. 255a, Argir, og er ætlanin at halda áfram við útstykkingini hjá Valbjørn Dalsgarð.

Eftir hesi ætlan skuldu raðhús byggjast fremst í útstykkingini. Umleið helvtin av hesum raðhúsum eru bygd og restina av økinum gjørt byggiklárt, soleiðis at klárt er at fara í gongd við at byggja.

Í uppruna ætlanini er pláss fyri 30 raðhúsum afturat, men tá er tætt bygt.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til:

- at eitt passandi øki verður frábýtt, at bjóða út til áhugaðar keyparar, við treyt um at byggjast skulu raðhús eftir einari ætlan, sum kommunan ger.
- at kommunan treytar sær, at byggingin í sambandi við góðsku og útsjónd er á minst sama støði sum verandi raðhúsabygging.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at frábýta økið, sum er ætlað til bygging av raðhúsum, og at bjóða økið út til áhugaðar keyparar at byggja raðhús á og at kommunan við søluni tryggjar sær, at byggingin í útsjónd verður á sama støði sum verandi raðhúsabygging.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at gera útbjóðingartilfar, ið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina, áðrenn økið verður boðið út til áhugaðar keyparar.

Heðin Mortensen og Jógvan Arge luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Niðanfyri er lýsing av útstykkingini "raðhúsabygging undir Kongavarða" sum liggur á økinum millum verandi raðhús og arbeiðshøllina við innkoyringina til Kongavarða.

Talan er um raðhús í 5 eindum við 5-7 húsum i hvørjari eind, íalt 30 eindir.

Samlaða økið, matr. nr. 255a, Argir er 19.504m2 + 65.601m2, ella tilsamans uml. 7½ ha.

Politiskt er ynski um at bjóða alt út í senn og skjótast gjørligt.

**1. Byggibúningararbeiði**

Kommunan hevur ikki dagførdar tekningar yvir økið og tí hevur verið neyðugt at tosa við teir sum hava gjørt útstykkingina og annars kanna viðurskiftini á staðnum. Vit mangla upplýsingar frá as-built tekningum.

Innleggingar:

Kloakk: Á økinum liggur ein skittvatnsleiðing ø160mm, pvc fram við tromini til reinsiverkið við íbindingina til Glyvursvegin. Frá skittvatnskloakkini liggja stikkleiðingar til øll raðhúsini, umvegis 315 mm gjøgnumrenningarbrunnar.

Regnvatn: Dimensiónin á regnvatnsleiðingini er ókend og liggur lutvíst í vegnum og annars umvegis økið, har høllin er staðsett. Tað framgongur ikki um stikk liggja inn til raðhúsini og onki sæst til hetta á staðnum.

Brúksvatn: Á økinum liggur ein ø110mm PH, sum liggur fram við vegnum í ovaru síðu. Tað framgongur ikki um stikk liggja inn til raðhúsini og onki sæst til hetta á staðnum.

Gøtuljós: Upplýsingar um gøtuljós eru mangulfullar.

El: Á økinum liggja 2 stk. 0.4 kV leiðingar fram við vegnum. Tað framgongur ikki um stikk liggja inn til raðhúsini og onki sæst til hetta á staðnum.

Tele o.a.: Á økinum liggur bert ein tele-innføring til økið omanfyri vegin, aðrar leiðingar eru ikki og onki sæst til hetta á staðnum.

Fjarhiti: Eingin skráseting er, men Høgni Lauritsen hevur upplýst, at fjarhiti liggur fram við vegnum á niðaru síðu, oman til niðasta raðhúsið sum er bygt.

Vegurin inn:

Vegurin inn til útstykkingina er ikki liðugur. Á ovaru síðu er gongubreyt og gøtuljós, men á niðaru síðu er hvørki gongubreyt ella gøtuljós. Vegurin hevur einvegis hall og yvirflatuvatn frá vegnum rennur oman á stykkini niðanfyri, her manglar gongubreyt, kantsteinar og vegbrunnar. Vegbanin er asfalteraður, men treingir til ábøtur.

Mál nr. 2011-2140/9 er skjal sum vísir manglar í sambandi við møguliga yvirtøku av vegnum.

Samanumtøka:

Staðfestast kann, at økið millum verandi raðhús og arbeiðshøllina við innkoyringina til Kongavarða ikki er byggibúgvið. Tað sær út til at kloakkleiðingar liggja inn til húsini, men annars mangla allar aðrar innleggingar umframt at vegurin inn til økið ikki er gjørdur liðugur.

Viðvíkjandi fjarhitaskipan, má kannast eftir um tað ber til at binda í verandi fjarhitaskipan.
Rættast hevði verið um kommunan fekk til vega rættaðar tekningar av økinum (as-built), soleiðis at kommunan, saman við ráðgeva, kann gera eina meira ítøkiligari lýsing av hvørjar innleggingar eru, hvar íbindingarnar kunnu verða osv. Lættast er at arbeiða víðari við upprunaligu ætlanini hjá Valbjørn Dalsgaard, við smærri rættingum.

**2. Søla av økinum**

Polittiskt er meldað út, at ynski er um:

- at kommunan ikki skal standa fyri arbeiðingum at byggja ella gera fundament og veggir.

- at økið skal seljast til at byggja raðhús á.
- at kommunali bíðilistin ikki skal brúkast
- at stykkini og eftirfylgjandi húsaeindirnar kunnu seljast í fríðari sølu.

Alment:
Tað besta hevði verið um kommunan stóð fyri at leggja allar leiðingar inn til húsini, áðrenn útbjóðing, so hetta ikki kemur at ávirka prísin negativt.

Kommunan eigur eisini at tryggja sær at byggingin verður gjøgnumførd.

Eindir:
Alt økið kann seljast samlað til 1 keypara ella býtast sundur í t.d. 5 eindir, sum verða seld hvør sær:

| Slag | Fyrimunir | Vansar |
|---|---|---|
| **Um alt verður boðið út í einum:** | Lættari at seta treytir, tá tað bert er ein at samráðast við, ísv. sølu og bygging.<br>Stórdrift gevur møguleika fyri størri vinningi pr. hús og harvið kanska hægri prís/boð uppá lendi?<br>Kunnu biðja keyparan leggja fjarhitaskipan.<br>Seta treytir fyri liðugtgerð pr. eind t.d. at byrjað verður innast. | Færri møguligir keyparar kann gera, at eftirspurningurin/-kappingin verður minni og harvið sannlíkt lægri prísur fyri lendi<br>Váðin hjá keypara er stórri (størri kapitalbinding) ið ávirkar prísin niðureftir fyri lendi.<br>Um samstarvi haltar, so steðgar kanska alt upp. |
| **Um boðið verður út í 5 einum:** | Sannlíkt er at fleiri áhugaðir keyparar verða og harvið størri kapping og hægri prís.<br>Minni váði kann gera at vit fáa hægri prís.<br>Minni kapitalbinding enn um boði út samlað | Fleiri partar skulu gera íbindingar í verandi leiðingar.<br>Trupult at biðja keyparar leggja fjarhitan, serliga um eigarar ikki semjast um at gera alt í senn. |

Hvør skal selja:
Kommunan kann sjálv standa fyri søluni ella lata meklara standa fyri søluni.

| Slag | Fyrimunir | Vansar |
|---|---|---|
| **Meklari selur:** | Meklarin ger sølutilfar, samskiftur við keypara og forhandlar. Meklari kann røkka fleiri keyparum og soleiðis ber helst til at fáa hægri boð.<br>Kommunan skal ikki hugsa um hvør bjóðar og hvør skal keypa. | Tað kostar.<br>Kenna minni til keyparar og proces. |

| **Kommunan selur:** | Betur stýr á sølu og tilboðum og kann samskifta og kunna møguligar keyparar betri. | Politikkur kann koma í Ábyrgdin liggur hjá kommununi, sum eisini skal gera tilfar og samskifta. |
|---|---|---|

Um kommunan skal standa fyri søluni, er neyðugt at fáa gjørt lýsingartilfar v.m. og peningur má avsetast til søluna.

Um meklari skal standa fyri søluni, kann roknast við, at kommunan kann fáa eitt tilboð uppá uml. 100.000 kr.

Prísur:
Roknað verður við, at meira fæst fyri økið um tað verður selt fyri hægstbjóðandi, við einum minsta prísi uppá t.d. kr. 300.000 fyri hvørja húsaeind. Eisini kann roknast við at fáa betri prís um ein eind verður seld í senn.

Um grundstykkjastøddin verður uml. 150 m2, svarar ein minstiprísur uppá kr. 300.000 til kr. 2.000 pr./m2.

Til samanlíkningar:

1) Mylnutjørn kostar 2.120 kr./m², ella kr. 451.681 pr/stk. liðugt planerað. (317 m² írokna fríøki/213 m² er byggifeltið)
2) Oman gil kostar 1381 kr/m², ella áleið 450.000 pr/stk. liðugt planerað. (325 m²)
3) Dýrindalsgøta, kostar 2.240 kr/m², ella áleið 336.000 pr/stk. liðugt planerað og soklarnir stoyptir.

Afturat prísinum sum verður ásettur, kemur:
- Íbindingargjald ísv byggiloyvi.
- Um bindast skal í verandi fjarhitaskipan, skal helst íbindingargjald gjaldast.
- Koma skaðar á veg, gongubreyt o.a., má eigarin gjalda fyri at fáa tað gjørt í stand aftur.

Kommunan kann selja økið óbyggibúgvið, soleiðis sum tað liggur í dag, ella kann kommunan byggibúgva økið áðrenn tað verður selt. Líka mikið hvør leistur verður valdur, so er neyðugt at gera eitt projekt av útstykkingini, sum skal góðkennast av kommununi, áðrenn arbeiðið byrjar.

Hitaverk
Sambært kortal, eiga verandi matriklarnir hitastøðina sum er, men tað er helst Eik sum hevur goldið støðina og ikki eigarar.

Tað er ikki upplýst um verandi hitastøð er so stór, at hon eisini kann geva hita til hesa bygningina. Hetta má kannast nærri. Verandi fjarhitaleiðing er ikki løgd oman til nýggju stykkini.

Best er at taka upp samráðingar við verandi eigarafelag um treytir fyri íbinding.

Fyrimunur við at brúka felags hitaverk er, at tað verða fleiri til at rinda fyri rakstur og viðlíkahald.

**3. Annað:**

Eigarafelag:
Tað vil avgjørt vera ein fyrimunur um útstykkingin verða partur av verandi eigarafelag og her eiga vit at tosa við verandi eigarafelag.

Tíðarætlan:
Stykkini eiga ikki at verða seld fyrr enn øll viðurskifti eru púra greit, serliga fyri tann sum skal bjóða, tí annars er vandi fyri at vit fáa lægri prísi og at málið seinni steðgar upp, tí tað er okkurt sum ikki er greitt.

Tíðarfreistir í skeytinum kunnu verða:

- Byggiloyvi skal verða fingið innan 1 ár eftir at skeytið er undirskrivað
- Byggingin skal verða byrjað innan 1½ ár eftir at skeytið er undirskrivað
- Byggingin skal verða liðug innan 3 ár eftir at skeytið er undirskrivað

Formur og útsjónd:
Byggingin skal í stórsta mun verða í samsvari við uppruna ætlanina hjá Valbjørn Dalsgaard viðvíkjandi tali av húsum, stødd og útsjónd.

Byggingin skal verða í samsvari við núverandi bygging, 2 hæddir umframt lága reising, og pláss skal verða fyri bilskúri, umframt at 2 p-pláss skulu verða á hvørjum grundstykki.

Byggingin skal hava somu frástøðu frá vegnum sum núverandi bygging, og ein byggilinja skal verða móti hamrinum, soleiðis at øll eru tryggjaði útsýni.

Byggivaldið tilskilar sær rætt at góðkenna tilfarsvalið.

Matrikkulering:
Áðrenn økið verður selt, má ein matrikkulplanur gerast. Øki má matrikkulerast til 1 ella 5 økir áðrenn endaligt skeyti verður undirskrivað og arbeiðið á staðnum fer í gongd. Sundurbýti í húsaeindir kann gerast tá brandmúrarnir eru gjørdir og góðkendir, ella í seinasta lagi áðrenn byggiváttan verður givin.

Málslýsingin omanfyri er gjørd av teknisku fyrisitingini, saman við løgdeildini.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyri nevndu lýsing, verður víst á fylgjandi møguleikar fyri at selja økið til bygging av raðhúsum:

Uppskot 1)
Um økið verður selt óbyggibúgvi soleiðis sum tað liggur, mælir tekniski stjórin til:

- at alt øki verður selt til ein keypara
- at eitt samla øki verður frámatrikkulerað at selja
- at kommunan sjálv stendur fyri søluni, herundir eisini at gera sølutilfar.
- at ein treyt við søluni verður, at keyparin skal lata inn eitt fullfíggja útstykkingarprojekt, sum m.a. vísir allar leiðingar, liðuggerð av vegi, fjarhita o.s.v. áðrenn arbeiðið byrjar.
- at tann sum hevur besta tilboðið, sum liggur omanfyri minstaprísin, vinnur útbjóðingina og at mett verður út frá prísi, tíðarætlan og konceptinum annars (kommunan skal kunna samráðast við møguleikar keyparar).

Uppskot 2)

Um økið verður selt í 5 eindum, mælir tekniski stjórin til:

- at kommunan, áðrenn sølan fer fram, kannar øll viðurskifti á staðnum og letur gera eitt fullfíggja útstykkingarprojekt av leiðingum, vegi og øðrum, sum keyparar skulu halda seg til.
- at játtaðar verða kr. 250.000 til ger av projekti
- at øki verður matrikkulerað í 5 eindir at selja
- at ein meklari kemur at standa fyri søluni, herundir eisini at gera sølutilfar.
- at eindirnar verða seldar ein og ein til hægstbjóðandi

Í báðum uppskotunum mælir tekniski stjórin til, at kommunan setir treytir í skeyti um:

- hvussu byggingin skal verða í støðd, staðseting og útsjónd
- hvussu íbinding av leiðingur og fjarhita skal verða
  tíðarætlan fyri byggingina

**Fíggjarnevnd 10. december 2014:** Útsett.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 15. december 2014:** Ein samd nevnd mælir býráðnum til at taka undir við uppskoti 1 omanfyri og at økið verður boðið út til sølu alment.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir býráðnum til at einstøku húsini verða boðin til sølu eftir bíðilistanum hjá kommununi.

**Býráðsfundir 15. desember 2014:** Fyrst varð atkvøtt um tvey broytingaruppskot frá Jógvani Arge.

Broytingaruppskot 1:
Einstøku húsini verða boðin til sølu eftir bíðilistanum hjá Tórshavnar kommunu.

Uppskotið fall við 3 atkvøðum fyri og 9 ímóti.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Tey, ið atkvøddu ímóti, vóru Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Bogi Andreasen greiddi ikki atkvøðu.

Broytingarsuppskot 2:
Kommunan ger økið byggibúgvi, áðrenn tað verður lýst til sølu.

Uppskotið fall við 3 atkvøðum fyri og 9 ímóti.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Tey, ið atkvøddu ímóti, vóru Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Bogi Andreasen greiddi ikki atkvøðu.

Síðani varð atkvøtt um tilmæli frá eini samdari fíggjarnevnd, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam

Marin Katrina Frýdal greiddi ikki atkvøðu.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Kunnað varð um málið.

# 53/15 Samlað útbjóðing av undirhondsboð av nýggjum fótbóltsvølli í Hoyvík og útstykking við Djúpagil í Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 23.06.2014 | 214/14 | 14/03366-84 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.06.2014 | 202/14 | 14/03366-84 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 132/14 | 14/03366-84 |
| 4 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 158/14 | 14/03366-84 |
| 5 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 53/15 | 14/03366-84 |

**Málslýsing:**
Umsitingin hevur, saman við HMP Consult arbeitt við gerð av nýggjum fótbóltsvølli í Hoyvík (sí j.nr. 14/000714 og 14/01462) og eisini eini útstykkingarætlan saman við LBF við Djúpagil (sí j.nr. 14/01452). Vegna væntandi stórt yvirskot av tilfari frá vøllinum og tilsvarnadi undirskot av tilfari til útstykkingina, varð samtykt (Tekniska nevnd 30. april 2014 og Fíggjarnevnd 01. maj 2014) at bjóða bæði prosjektini út saman sum undirhondsboð, við luttøku av J&K Petersen og Articon.

Undirhondsboðini skuldu vera kommununi í hendi seinast 3. juni 2014 kl 14.00.

Úrslitini vóru hesi:

| | |
|---|---|
| J&K Petersen | kr. 24.804.771 |
| Articon | kr. 27.886.745 |

Ráðgevarnir hava mett um undirhondsboðini (sí j.nr. 14/03366-53 og j.nr. 14/03366-52) og mælt til at taka av lægra undirhondsboðnum frá J&K Petersen.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Metti fíggjartørvurin fyri liðugtgerð av nýggjum fótbóltsvølli í Hoyvík er útroknaður av umsitingini, sí j.nr. 14/03366-87. Tøka játtanin, íroknað stuðul frá FSF, er kr. 10,1 mió.
Írestandi fíggjartørvurin er sostatt kr. 19.047.851.

Metti kostnaðurin fyri útstykkingina við Djúpagil í Hoyvík er útroknaður av umsitingini, sí j.nr. 14/03366-86.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til at taka av tilboðnum frá J&K Petersen uppá útstykkingina Djúpagil og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum frá J&K Petersen uppá fótbóltsvøllin í Hoyvík og at játta kr. 19.047.851 av íløgukontu 5775 Vøllur í Hoyvík til hesa verkætlanina umframt stuðul frá FSF kr. 0,6 mió. og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 23. juni 2014:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, tekur støðu á seinni fundi.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at heita á umsitingina um at samráðast við tilboðsgevaran um arbeiði fyri tøku upphæddina á íløguætlanini íroknað stuðulin frá FSF kr. 9.604.000,- og leggja fyri nevndina aftur.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið fyri læstum hurðum 25. juni 2014:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Eftir samráðingar við J&K Petersen, eru partarnir komnir ásamt um tey neyðugu arbeiði, ið kunnu gerast við tøku játtanini. Arbeiðið at stoypa ljóssteyrafundamentir og leggja tilhoyrandi dragirør, er ikki íroknað. Mett verður rættast at gera hetta arbeiði samstundis, tí tað er trupult at koma aftur umaftur. Arbeiðið er mett at kosta kr. 1 mió. Samlað tilboðsupphædd verður tá kr. 13.647.912 u/mvg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og trivnaðarstjórin mæla til at gera sáttmála við J&K Petersen à kr 13.647.912 íroknað at gera ljóssteyrafundament við tilhoyrandi dragirørum.

**Mentamálanevndin 18. mars 2015**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. mars 2015:** Samtytk at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Atkvøtt varð um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam

Ímóti atkvøddi
Marin Katrina Frýdal

Marin Katrina Frýdal ynskti hesa serstøku viðmerking í gerðarbókina: at Marin Katrina Frýdal heldur tað ikki vera rætt at játta fótbóltinum enn meira pening, meðan aðrar ítróttargreinar ikki verða stuðlaðar samsvarandi.

## 54/15 Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval í Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 54/15 | 15/00864-1 |

**Málslýsing**:

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Vald vórðu Ingunn Eiriksdóttir, Jóannes Dalsgarð, Jógvan Martin Mørk, Birgit Arge og Jóan Petur Hentze

# 55/15 Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 55/15 | 15/00865-1 |

**Málslýsing**:

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Vald vórðu Gunnar Reynslág, Zacharias Johansen, Birgit Andersen og Valbjørn Dalsgarð.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundir**<br>19. mars 2015 | Blað nr.: 12170<br>Formansins merki: |

## 56/15 Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval í Hesti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 56/15 | 15/00867-1 |

**Málslýsing**:

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Vald vórðu Jacob Pauli Silvurstein, Fríðbjørg Zachariasen og Petur Lyngvej

# 57/15 Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval á Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 57/15 | 15/00866-1 |

**Málslýsing**:

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Vald vórðu Jógvan Frýdal, Ragnhild Sandoy og Súsanna Andreasen

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundir**<br>19. mars 2015 | Blað nr.: 12172<br><br>Formansins merki: |

# 58/15 Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval í Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 58/15 | 15/00868-1 |

**Málslýsing**:

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Vald vórðu Sune Hansen, Kirsten Jacobsen og Anny Niclasen.

## 59/15 Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 59/15 | 15/00871-1 |

**Málslýsing**:

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Vald vórðu Jórun Petersen, Johannis Petersen og Finnbjørn Simonsen.

# 60/15 Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 60/15 | 15/00872-1 |

**Málslýsing**:

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Vald vórðu Elna Debess, Arnbjørn Kristiansen, Christian Martin Dam og Marian Jacobsen

# 61/15 Leigusáttmáli við FSF um høli til skúlabrúks í nýggja bygninginum við Tórsvøll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 232/14 | 14/05119-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 14.01.2015 | 2/15 | 14/05119-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 21.01.2015 | 12/15 | 14/05119-2 |
| 4 Fíggjarnevnd | 18.02.2015 | 42/15 | 14/05119-2 |
| 5 Fíggjarnevnd | 18.03.2015 | 80/15 | 14/05119-2 |
| 6 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 61/15 | 14/05119-2 |

**Málslýsing**:
9.flokkarnir hjá Kommunuskúlanum eru í fyribilshølunum við Sjónleikarhúsið. Har eru fýra góðar skúlastovur, men einki minni høli ella stað er uttanfyri flokshølini, har tað ber til at arbeiða í smærri bólkum ella at hugsavna seg um arbeiðsuppgávur, tá tørvur er á tí. Næmingarnir í fyribilshølunum við Sjónleikarhúsið hava einki uttanduraøki, og inni er umfarmt skúlastovuna einki stað, har teir kunnu vera í fríkorterunum.

Fyribilshølini við Sjónleikarhúsið hava staðið har síðan skúlaárbyrjan 2007, og loyvið er longt nakrar ferðir. Brúksavtalan við Sjónleikarhúsið var upprunaliga galdandi í trý ár, men eisini hon er longd, og er nú galdandi til august 2015.

Í nýggja bygninginum við Tórsvøll verður 2. hædd (miðhæddin) innrættað soleiðis, at hon er vælegnað til undirvísing, og mett verður, at ein góð loysn viðvíkjandi hølisumstøðunum hjá 9. flokkunum í Tórshavnar Kommunuskúla er at leiga hesi høli til 9. flokkarnar. Skúlin metir, at tað eisini verður pláss fyri 8.F, sum er fótbóltsflokkurin í 8. árgangi.

Skúlaárið 2014/2015 eru 99 næmingar í 9. flokkunum í Tórshavnar Kommunuskúla, og í fótbóltsflokkinum í 8. árgangi eru 27 næmingar.

Møguleiki er at leiga miðhæddina í nýggja FSF bygninginum í Gundadali fyri kr. 31.904,17 um mánaðin. Hølini er 589 $m^2$ til víddar. Sambært uppskotinum til leigusáttmála, skal leigarin umframt leigu rinda fyri reingerð, el- og hitanýtslu.

Um flutt verður úr fyribilshølunum við Sjónleikarhúsið, kunnu tey takast niður og leigumálið við Ramirent um W.C-vognin kann sigast upp. Tá hølini eru tikin niður fær Sjónleikarhúsið parkeringsøkið aftur.

Tá leigumálið við W.C.-vogninum er trekt frá, kostar leigumálið við FSF uml. 350.000 kr. árliga. Leggjast má tí upp fyri hesum tørvi á meirfígging í fíggjarætlanini til Kommunuskúlan.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til at góðkenna leigusáttmálan millum Fótbóltssamband Føroya og Tórshavnar kommunu, og at kr. 350.000 verða játtaðar til rakstrarkontu Kommunuskúlans.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Tikið av skrá.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundir**<br>19. mars 2015 | Blað nr.: 12176<br><br>Formansins merki: |

**Ískoyti:**
Eftir nýggja samráðing verður leigugjaldið kr. 500 fermeturin, tað er kr. 294.500 um árið. Mælt verður til at selja fyribilshølini við Sjónleikarhúsið til tess at fíggja leigugjaldið í 2015 saman við spardu útreiðslunum til leigu av wc-vogni uml. kr. 35.000 árliga.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna leigusáttmálan.

**Mentamálanevndin 14. januar 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, taka undir við tilmælinum, og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur ikki undir við leigusáttmálanum.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 18. februar 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykkja at bjóða FSF at gera sáttmála við leigugjaldið áljóðandi kr. 500 fyri fermeturin íroknað ljós og hita.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur ikki undir við at gera leigusáttmála við FSF.

**Fíggjarnevnd 18. marts 2015:** Samtykt at gera sáttmála við FSF um leigugjald áljóðandi kr. 500 fyri fermeturin íroknað ljós og hita, so sum avtalað er við FSF.

Jógvan Arge krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Atkvøtt varð um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:40**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Johan Olsen |
| | Sigrún Amalia Mohr | |